# Fróðskaparsetur Føroya søkir eftir rektara

## Starvið sum rektari við Fróðskaparsetur Føroya er leyst at søkja

**Starvsøki**
Sambært løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 hevur rektarin dagligu leiðsluna av Fróðskaparsetri Føroya innan teir karmar, sum stýrið hevur ásett. Víst verður í hesum sambandi til Rektarafyriskipan frá 17. mars 2010.

Umsøkjarar eiga á heimasíðuni www.setur.fo at gera seg kunnugar við skjølini: Rektarafyriskipan; Fróðskaparsetrið, avbjóðingar og krøv til rektaran; Tíðarætlan og setanarnevnd.

**Førleikakrøv**
Í løgtingslógini um Fróðskaparsetur Føroya § 14, stk. 1 er ásett soljóðandi:

"Rektari skal hava royndir av leiðslu og kunnleika um granskingarumhvørvi, skal hava royndir og innlit í útbúgvingarøkið og hava skil fyri samspælið millum stovnin og samfelagið sum heild."

Somuleiðis verður kravt, at komandi rektarin hevur skjalprógvaðan granskingarførleika.

**Setanartreytir og umsókn**
Starvið sum rektari verður lønt í 39. lønarflokki sambært lønartalvuni fyri Tænastumannafelag Landsins, tó uttan at vera tænastumannastarv, og við 15% í eftirlønargjaldi.

Starvið verður áramálssett og setanartreytir annars verða ásettar í sersáttmála. Veitt verður viðbót áljóðandi 10% fyri áramálssetan.

**Umsóknarfreistin er 27. apríl 2011.**

Umsóknir saman við avriti av próvskjølum, CV og arbeiðsroyndum skulu sendast stýrisformanninum:

Herálvur Joensen
Sendistova Føroya í Keypmannahavn
Strandgade 91, 4. loft
1401 København K
Danmark

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Herálv Joensen, stýrisformann, á heralvurj@mfa.fo ella á tlf. +45 32833770.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

# Starv sum rættlesari og journalleiðari á Fróðskaparsetri Føroya

Søkt verður eftir starvsfólki til rættlestur, journalisering og aðrar fyrisitingarligar uppgávur á Setursskrivstovuni, at byrja 1. apríl 2011 ella skjótast til ber.

**Starvið**
Í samstarvi við leiðslu og fyrisiting á Fróðskaparsetrinum fert tú millum annað at taka tær av hesum uppgávum:
- Rættlestur av teksti til heimasíðuna, lýsingum, fundarfrágreiðingum og øðrum teksti á Setursskrivstovuni
- At hava administratorrættindi á journalini, undirvísa í brúki av journalini og journalisera fyri Setursskrivstovuna
- Samskipa próvtøkur fyri onnur universitet
- Dagføring av heimasíðuni
- Fremja vanligar fyrisitingarligar uppgávur

**Førleikar**
Vit vænta, at tú hevur:
- Støðisnám í føroyskum ella samsvarandi
- Hollan telduførleika
- Góðan málsligan førleika og skrivar rætt, serliga á føroyskum, men eisini á enskum
- Áhuga í útbúgvingarviðurskiftum
- Góð samstarvsevni og ert fyrikomandi
- Evni at arbeiða sjálvstøðugt og ert málsøkin
- Evni at tillaga teg til broyttar arbeiðsumstøður

**Setanartreytir**
Talan er um eitt fulltíðarstarv. Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarflokki V.

**Umsókn**
Umsókn við avriti av prógvum, ævisøgu (CV) og møguligum viðmælum skulu vera Fróðskaparsetrinum í hendi í seinasta lagi tórsdagin 8. apríl 2011. Fleiri upplýsingar um Fróðskaparsetur Føroya eru at finna á heimasíðuni www.setur.fo. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til fyrisitingarstjóran, Rúnu Hjelm á runah@setur.fo ella á telefon 292504, ella til fíggjarleiðaran, Hugin Skaalum á hugins@setur.fo ella á telefon 292507.

Umsóknir skulu sendast til setur@setur.fo ella til:
Fróðskaparsetur Føroya
Setursskrivstovuna
J.C. Svabos gøtu 14
FO-100 Tórshavn

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

**Klaksvíkar Sjúkrahús**
Tlf: 45 45 45 lokal 123
Fax: 45 73 63 · 700 Klaksvík

# Læknaskrivari

Á sjúkrahúsinum er eitt fast starv sum læknaskrivari leyst at søkja til setan 01.06.2011. Arbeiðstíðin er 1,0.

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum læknaskrivari
- dugir at raðfesta arbeiði, sum til tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- teldukunnleiki

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Skrivlig umsókn, saman við avriti av prógvi v.m., verður at senda til:

Hera Ellingsgaard, sjúkrahússtjóra
Klaksvíkar Sjúkrahús
FO-700 Klaksvík

**Umsóknarfreist 08.04.2011**

# Ársaðalfundur

Ársaðalfundur felagsins og eftirlønargrunnsins, sum skuldi vera nú leygardagin 26. mars er fluttur eina viku.

Nýggjur fundur verður leygardagin hin 2.apríl kl. 16 á Hotel Hafnia

Skrá sambært lógum felagsins og, sum lýst í bløðunum.

**NEVNDIRNAR**

## Klaverstemming, egalisering og umvæling

Undiritaði er yrkislærdur klaverstemmari / klaverteknikkari og limur í nevndini hjá Dansk Pianostemmerforening.

**Eg verið í Føroyum frá leygardegnum 7. maj til sunnudagin 15. Maj.**

Umframt at stemma títt klaverflygel, kann eg eisini geva tilboð uppá stilling, egalisering og møguliga umvæling. Tað arbeiði verður gjørt í heyst tá eg havi ætlanir um at koma aftur til Føroyar.

Hevur hetta tín áhuga, kanst tú ringja til tónleikalæraran **Árna Hansen tlf. 31 41 83**

**Søren Egetved-Sørensen**
*Pianokompagniet*



# Heimsins herligastu til sølu



**Spf 3276 (Túgvurnar)**

**Við í keypinum:**
- On-line bíleggingarskipan
- On-line bókhaldsskipan
- Allar komandi bíleggingar

*www.tugvurnar.fo*
**Áhugaði ringja til + 45 4027 1195**

# Aðalfundur

Aðalfundur felagsins verður mikudagin 27. apríl 2011 kl. 19.00 í Sjónleikarhúsinum.

Skrá sambært lógum felagsins

**Havnar Sjónleikarfelag**